Far Sapphire. Mynd: Farstad Shipping

# Frálandavinnur berjast fyri at yvirliva

**Jógvan Hugo Gardar**

04.10.2015 - 10:35

Oljan.fo

Hjá eigarunum av veitingarskipunum innan frálandavinnuna eru dagarnir krevjandi. Onkri glottar eru at hoyra frá onkrum felagið, men samlaða myndin er ein vinna sum frá at hava góðar dagar fyri einum góðum ári síðani, til eina vinnu har eigararnir undirbjóða hvørjum øðrum fyri at fáa fatur á teimum avtalunum sum koma á marknaðin.

Hóast nakrar glottar, so er týðuligt at tey flestu reiðaríini sigla í tungari aldu, og fleiri skip liggja fyri teym. Nú eru skjót 90 veitingarskip bara hjá norðmonnum arbeiðsleys. Skip sum fyri fáum mánaðum síðani høvdu úr at gera.

Dagens Næringsliv skrivar at óttin fyri gongdini er týðuligur millum eigararnar.

- Í løtuni gera eigararnir hvat sum helst fyri at yvirliva í einum sera krevjandi marknaði. Skip og boripallar verða lagdir, fólk verða søgd úr starvi, fekøg verða umskipa, og avtalur verða broyttar og nýggjar avtalur verða avlýstar fyri at kreppaní oljuvinnuni ikki skal raka so meint, sigur stjórin í norska reiðarafelagnum, Stura Henriksen, í samrøðu við Dagens Næringsliv.

Skipsmeklarar upplýstu fríggjadagin at 117 veitingarskip eru tøk og arbeiðsleys í Noregi og í Bretlandi.

Åge Remøy, reiðari í Rem Offshore, sigur við Dagens Næringsliv at tað ikki eru nóg nógv skip tikin úr vinnu enn, fyri at fáa javnvág í kappingina um tær avtalurnar sum hóast alt koma á marknaðin. Hansara boð eru at fleiri skip og boripallar mugu takast úr vinnuni.